

## Hjalti er stjørnuskotið

16 ára gamli Hjalti Toftum Jógvansson, varð kosin Ársins Stjørnuskot, tá Steypakappingin og Talvgallaveitslan varð hildin leygardagin við Gjógv. Innstillaðir vóru 3 unglingar, sum hvør í sínum lagi hava staðið seg væl í farna kappingarárinum. Unglingar í sera stórari menning. Umframt Hjalta vóru innstillaðir: Unglingaføroyameistarin, Heiðrikur Tindskarð Jacobsen og Rógvi Egilstoft Nielsen, úr Sandavági. Tá talt varð saman, mettu telvararnir, at Hjalti hevði uppiborið heiðurin í ár, eftir eitt sera gott kappingarár. Styrkitalið er hækkað 255 stig og FM gull varð vunnið í 1. bólki á Páskum, umframt at FM heitið í U16 varð vunnið fyrr í kappingarárinum. Umframt snotuliga minnisplátu, stuðlar Talvsamband Føroyar Ársins Stjørnuskoti við kr. 3.000 til framhaldandi menning innan telvingina.

## Ólavur átti vakrasta talvið

Heiðurin fyri vakrasta talvið frá FM fyri einstaklingar, sum varð telvað á Páskum í Tórhavn, varð latin Ólavi Simonsen, úr Klaksvíkar Talvfelag. Eftirmetingarnevnd gjørdi úrskurð ímillum innsendu talvini. Ólavur var avgjørdur favorittur at vinna heiðurin, við atliti at sera snøgga sigrinum á Finnbirni Vang. Hinvegin metti nevndin, at sigurin á Helga Dam Ziska var vakrasta talvið í FM kappingini. Ólavur hevur við heiðurinum lagt seg klárt á odda í vakurleikasteypum. Ofta undirhaldandi álopstelvingin hevur higartil givið heili fimm vakurleikasteyp.

# Jón Rói gevst fyribils

**- Eg havi livað og andað fyri fótbóltin seinastu seks árini, og vil nú fegin royna okkurt annað, sigur Jón Rói Jacobsen, sum um vikuskiftið tók avgerð um at gevast við fótbóltinum fyribils**

**FÓTBÓLTUR**
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Jón Rói Jacobsen verður komandi tíðina ikki tøkur hjá landsliðsvenjaranum Brian Kerr ella øðrum fótbóltsfeløgum. Hann boðaði um vikuskiftið frá, at hann fyribils gevst við fótbóltinum.

26 ára gamli havnarmaðurin hevur seinastu árini verið búsitandi í Danmark, har hann fyrst og fremst hevur roynt seg sum yrkisleikari. Tað er hugurin ikki av álvara til longur, og útbúgving fyribils hevur drigið hann burtur frá fótbóltinum.



*Eftir 31 dystir á føroyska fótbóltslandsliðnum hevur Jón Rói Jacobsen fyribils takkað fyri seg*

### Torfor avgerð

Jón Rói Jacobsen, sum seinasta árið hevur spælt við Frem í næstbestu donsku deildini, ætlar sær nú at royna nýggjar avbjóðingar. Hann fer eftir summarfrítíðina undir útbúgving, men hann veit framvegis ikki, hvat hann ætlar at lesa.

- Eg havi livað og andað fyri fótbóltin seinastu seks árini, og vil nú fegin royna okkurt annað.

*Var avgerðin torfør at taka?*

- Ja, sjálvandi. Eg havi prátað við familjuna um tað í eina tíð, og nú er avgerðin tikin, sigur Jón Rói Jacobsen, sum higartil hevur umboðað barndómsfelagið HB, Brøndby, AaB og Frem.

### Kerr var bilsin

Jón Rói Jacobsen var ein av bjartastu stjørnunum á føroyska fótbóltshiminum, tá hann, sum 18 ára gamalur, fyri fyrstu ferð royndi seg á landsliðnum. Tað var, tá Sveis vitjaði á Svangaskarði í 2001. Hann var tá yngsti føroyingur, sum hevði roynt seg í altjóða skrásettum landsdysti.

Jón Rói Jacobsen, sum higartil hevur spælt 31 landsdystir fyri Føroyar, boðaði í farnu viku Brian Kerr, landsliðsvenjara, frá sínu avgerð. Og írin var sjálvsagt harmur um, at hann ikki hevur 26 ára gamla verjuleikaran tøkan til uppgávurnar, sum bíða føroyska fótbóltslandsliðnum.

- Hann var eitt sindur bilsin, tí hann hevði neyvan væntað tað. Hann sá fegin, at eg var við í hópinum, tí eg við tíðini eri vorðin ein av teimum meira royndu í landsliðshøpi. Men hann skilti mína støðu, sigur Jón Rói Jacobsen, sum ikki vísir aftur, at hann eina ferð verður at síggja á fótbóltsvøllinum aftur.

- Tú skal ongantíð siga ongantíð. Satt at siga veit eg ikki, hvat framtíðin fer at bjóða. Tí dugi eg hvørki at svara, nær eg fari at spæla fótbólt aftur, ella um eg fari at spæla fótbólt aftur, staðfestir Jón Rói Jacobsen.

### FAKTA um Jón Rói Jacobsen

**Navn**: Jón Rói Jacobsen
**Føddur**: 7. apríl 1983
**Aldur**: 26 ár
**Tjóðskapur**: Føroyar
**Landsdystir**: 31 dystir
**Pláss**: Verjuleikari
**Hædd**: 1,86 m

**Yrkisleiðin:**
**1999-2003**: HB Tórshavn, 52 dystir og 25 mál
**2003**: Brøndby IF, leigusáttmáli, fýra dystir
**2004-2005**: Frem, 42 dystir og fimm mál
**2006-2008**: AaB Aalborg, 14 dystir og eitt mál
**2008-2009**: Frem, 14 dystir
*Kelda: wikipedia.org*

## Helgi er besti telvarin

**Helgi Dam Ziska vann ikki óvæntað heiðurin sum ársins telvari 2008/09**

**TALV**
*Jógvan Joensen*
*jogvan@kallnet.fo*

Í sambandi við steypakappingina og Talvgalla við Gjógv, atkvøddu 6 umboð úr hvørjum talvfelagi um Ársins Telvarar 2008/09. Innstillaðir vóru 3 telvarar: Herborg Hansen, úr Klakvík, IM Helgi Dam Ziska og Martin Poulsen, báðir úr Tórshavn.

Eftir at drigið varð saman um atkvøðuúrslitið gjørdist greitt, IM Helgi Dam Ziska - 3. árið upp í slag - varð kosin Ársins Telvari 2008/09.

Hóast bert 18 ára gamalur, hevur Helgi megnað at bitið seg fastan á 1. plássinum á føroyska styrkilistanum. Søguligt NM Gull til Føroyar og sera munadygg OL-úrtøka í Dresden, eru bara nøkur av avrikunum, sum teir, ið atkvøddu ivaleyst hava heft seg við.

Umframt heiðurin, stuðlar Talvsamband Føroya Ársins Telvarar, við kr. 3.000 til framhaldandi menning innan telvingina.



*Sera fegin formaður í Havnar Telvingarfelag, Ronny í Lon, tók ímóti heiðurinum, vegna Helga, sum hevði forfall*